Sandurin:
fríggjakvøld 21.30: Eivør Pálsdóttir (Fo)
leygarkvøld 23.15: Clickhaze (Fo)

# Eivør á heimavølli

**Hon er ikki nógv at síggja her í Føroyum, songstjørnan úr Gøtu. Tað er ikki hvønn dag, áhugaði hava møguleikan at síggja, hvat hon hevur at bjóða, men tá G! Festivalurin spyr hana, er hon við uppá at spæla í heimbygdini Gøtu**

G! FESTIVAL
*Rógvi Borðoy*

Eivør Páldsóttir er í Føroyum í hesum døgum í sambandi við G! Festivalin. Hon skal spæla við egnum bólki og saman við gomlu kenningunum úr Clickhaze, og hevur stórar vónir til festivalin.

- Eg komi bara inn mitt í tí heila, og síggi fólk, sum stríðast og stressast við at fáa alt upp at standa. Eg kenni, at fólkini eru sterk og trúgva fast uppá verkætlanina, og tað er gott at kenna, sigur Eivør Pálsdóttir, meðan hon drekkur sær eina [vegr].

### Føroyar draga

Eivør býr dagliga í Íslandi, har hon hevur tónleikabólk sín, og trívist væl. Meiningin var einans at vera búgvandi har í tveir mánaðir, men hon kom ikki heimaftur beinanvegin.

-Tað var ikki eitt karrieruval. Eg treivst væl haryviri, og so varð eg bara búgvandi, sigur hon.

Hon sigur, at henni leingist til Føroya, og væntar, at hon flytir heimaftur um ikki langa tíð.

**- Mær leingist eftir fólkunum, náttúruni, fjøllunum og sjónum.**

### Víða um

Eivør hevur í seinastuni verið úti og ferðast í sambandi við tónleik í Evropa og USA. Týskland og New York hava verið mál hjá Yggdrasil, har hon eisini hevur verið virkin, og við egna bólki sínum hevur hon verið í Íslandi og Skandinavia.

- Mær dámar væl at ferðast við tónleikinum. Fólk hava eisini tikið væl ímóti okkum. Tey hava víst ein sera positivan hugburð.

Besta konsertupplivilsið, hon sigur seg hava havt í seinastuni var í Íslandi í einum lítlum spælistaði, ið kallast Kaffileikhúsið. Staðið er lítið og minnir mest av øllum um Losjuna í Gøtu. Har var tónleikabólkurin settur í miðjuna av gólvinum, og fólk sótu so allan vegin rundanum.

- Tað var sum at sita í einari stovu, sigur Eivør Pálsdóttir við einum smílandi eygnabrá.

Hon leggur aftrat, at henni dámar best at framføra tónleik í smærri støðum heldur enn stórum konsertum.

**- Ein kemur nærri inn á fólkini, sum lurta, í smáum spælistøðum. Og tað er ein torførur kunstur at sleppa inn at fólki á stórum konsertum.**

### G! stóran týdning

Tað er umráðandi, at føroyskir tónleikarar sleppa at framføra tónleik sín. Tað sigur Eivør Pálsdóttir millum annað sum grundgeving fyri, at G! Festivalurin er ein umráðandi partur av føroyskum tónleikalívi.

Víðari sigur hon um tónleikasamtakið Grót, at samtakið fer at vera í tónleikasøguni hjá Føroyum, tí tey gera so nógv fyri føroyska tónleikin. Tað er gott at hava eitt slíkt samtak, tí tað er ein lætti hjá tónleikarunum at hava onkran at taka sær av truplu støðunum, ein kann koma í. Tónleikararnir kunna fáast meir við tónleik, og verða ikki noyddir at hugsa um pengar og aðrar trupulleikar.

### Baklandið eru sálmarnir

Føroyar og tónleikamentanin í Føroyum eru tónlistarligi upprunin hjá Eivør Pálsdóttir. Sjálv hoyrir hon væl Føroyar í tónleiki sínum, og vónar, at onnur gera tað eisini.

- Sálmarnir hjá Kingo eru baklandið hjá mær. Eg havi brúk fyri einari rót, eg má hava okkurt at vera út frá. Eg syngi ikki beinleiðis Kingosálmar alla tíðina, men Kingo er ein liður í øllum mínum tónleiki, sigur Eivør umhugsið, og heldur fram, at tað var Kári Sverrisson, sum byrjaði at umtulka sálmarnar hjá Kingo, og tað hevur hon stóra virðing fyri. Kingo hoyrist eisini í rokktónleikinum hjá Eivør Pálsdóttir, sigur hon.

Henni dámar best at syngja á føroyskum, tí tað er hóast alt hennara móðirsmál.

**- Eg haldi sjálv, at eg syngi best á føroyskum, og tað man vera sum at skelda onkran út. Tað er ringt at fáa alt út, um tað gongur fyri seg á øðrum máli enn móðirsmálinum.**

### Nýggj fløga

Eivør Pálsdóttir hevur verið í Íslandi og upptikið eina fløgu, sum væntandi verður til keyps í september mánaði. Fløgan hevur bara egin løg, og tey eru um kærleika og annað, sigur hon. Fløgan er upptikin í Rainbow Studio í Oslo, Noregi, og á fløguni verða væntandi 10 løg.

Eivør sigur, at í Íslandi verður kanska arbeitt nakað meir álvarsligt við tónleikinum. Í Føroyum eru fólkini ikki so neyv við tíðarætlanini, sigur hon.

- Í Føroyum er tað so, at um ein skal møtast klokkan fimm at venja, so verður farið í gongd klokkan sjey, og tað er einki galið við tí. Tað hevur sína sjarmu.

Tónleikurin á fløguni verður mest fólkatónleikur, og tað er eisini rætta elementið hjá Eivør.

### Sandurin bíðar

Tá blaðið fór til prentingar, hevði Eivør Pálsdóttir ikki spælt á Sandinum enn við egna bólkinum. Hon spælir síðst á kvøldinum, og løgini, sum hon fer at spæla á konsertini verða bæði til gaman og álvara. Okkurt tilfar er longu kent, og okkurt fær sína frumframførslu á G! Festivalinum.




*Eivør Pálsdóttir verður eisini at hoyra á G! Festivalinum, bæði við egnum bólki og við Clickhaze*

*Mynd: Rógvi Borðoy*

Sandurin 21.15: Bomfunk MC's

# Finskir úrmælingar á G! Festivalinum

**Teir eru eitt av størstu nøvnunum, sum nakrantíð hava vitjað Føroyar, og teir hava spælt á øllum umráðandi pallum í Evropa, áðrenn teir komu hendan vegin**

G! FESTIVAL
*Rógvi Borðoy*



*DJ Gismo (vinstrumegin) og B.O.W ella Ismo Lappalainen og Raymond Eubanks, sum veruligu nøvn teirra eru. Hesir eru við í Bomfunk MC's, sum spæla á Sandinum í kvøld klokkan 21.15*

Tað eru teir fýra B.O.W, DJ Gismo, Villy og AT, sum mynda bólkin, sum má sigast at vera høvuðsnavnið á G! Festivalinum. Eisini hava teir nakrar dansarar við, sum kalla seg B-boys og B-girls.

Flestu ungdómar munna kenna løgini "B-boys and flygirls" og "Super Electric" sum bæði hava verið á hittlistum um alt Evropa gjøgnum seinastu árini. Lagið "Freestyler", sum seldi 2,2 milliónir eintøk og gjørdist nummar eitt á listunum í níggju londum, er tó mest kenda lagið, sum hip-hoppararnir úr Finnlandi hava givið út, og lagið hevur sett síni spor um allan tónleikaheimin, eisini her í Føroyum. Sangurin hevur millum annað givið navn til eitt serligt slag av tónleikatiltøkum í Føroyum, sum verða kallað tað sama: Freestyler.

Bomfunk MC's eru vorðnir ambassadørar fyri Finnland á sama stigi sum Mika Hakkinen. Teir hava selt meir enn til platin, og hava vunnið hópin av heiðurslønum um allan heimin.

Tónarnir eru mest av øllum grundaðir í hip-hop , men Bomfunk MC's hava samstundis megnað at endurnýggja 80'ara-diskoteksljóðið, so tú fært tað beint í andlitið. Tú merkir beinanvegin, at tónleikurin ikki er tann djúpasti í heiminum, men tað er heldur ikki meiningin. Tónleikurin skal bara fáa teg at dansa, og tað skal nógv til at standa ímóti, at beinini spakuliga byrja at trampa í takt til pulserandi diskorútmurnar.

Pallframførslan sigst eisini vera í ovara enda. Dansararnir gera nógvan mun, og teir sigast eisini duga at fáa áskoðararnar við. Og um nóg nógv fólk finna sær veg til Sandin, kann roknast við, at ein sera góð konsert kann fara fram leygarkvøldið.



# Kári og fólkatónleikur á G! 2003

**Bomfunk MC´s, DJ´arar við tekno og harðari tónar eru nakað av tí G! Festivalurin borðreiðir við í ár. Men ein tónleikagrein, ið eisini verður væl umboðað, er fólkatónleikurin bæði uttan úr heimi eins og úr Føroyum. G! Festivalurin hevur eins og í fjør havt eitt samstarv við Fólkatónleikarastevnuna, sum í fleiri ár hevur havt eitt virksemi koyrandi her á landi. Hendan stevnan er við tíðini vorðin til eina siðvenju, ið hevur ein týðandi leiklut og ávirkan á tað føroyska tónleikalívið. Kári Sverrisson er og hevur í fleiri ár verið ein av høvuðsmonnunum aftanfyri júst hendan partin av tónleikinum herheima.**



*Kári Sverrisson*

SANDURIN

### 17.45: Enekk (Fo)

Enekk er ein bólkur, sum hevur nógv tilfar at taka av. Tónleikurin hjá bólkinum hevur vakt miklan ans millum føroyskar tónleikarar og er hesin tónleikurin nógv virdur. Tríggjar útgávur eru komnar frá hesum bólkinum og nýtt tilfar er gjørt, sum væntandi kemur út á fløgu í heyst.

Hesin bólkurin hevur bygt tónleikaligar brýr millum ymiskar siðvenjur og mentanir - alt frá kvæðum og kingosangi, fólka- og spælimannstónleiki til nýggjan rokk og jazz. Ein kann siga, at Enekk er ein av føroysku bólkunum, ið ger eldru tónleikatraditiónina lættari at koma innat.

Kári Sverrisson er kjarnin og drívmegin í bólkinum. Hesin er eitt stórt føroyskt tónleikanavn, nokk fæst hann dagliga við tónleikin, annars er hann í lærarastarvi á Toftum. Herfyri gav hann solofløguna "Við heimsins dyr" út. Hetta er avgjørt eitt spennandi tónleikaligt íkast, serliga av tí heilt einastandandi vokalinum hjá Kára Sverrissyni.

Kári er sera spentur at spæla leygardagin, hendan dagin ger fólkatónleikarastevnan eitt legg inn til Syðrugøtu.

- Í fjør spældu vit saman við nøkrum bulgarskum tónleikarum, so í ár verður tað eitt sindur øðrvísi! Mær dámar tiltakið sera væl, sera positivt. Fólkatónleikarastevnan hevur aftur í ár eitt samstarv við G! Festivalin. Tann stevnan er byrjað og verður í Syðrugøtu leygardagin. Sunnudagin verður hon í Norðurlandahúsin, mánakvøldið fáa mykinesfólk vitjan av fólkatónleikarum.

Okkurt av nýggja tilfarinum verður at hoyra á sandinum leygardagin.

- Tónleikurin, sum vit fara at spæla verður eitt sindur av gamla tilfarinum og so eisini av tí nýggja tilfarinum. Um ein sjangra skal nevnast er tað jazzfólkatónleikur.

Kári Sverrisson er ein virkin tónleikari og hevur eisini framtíðarætlanir

- Jú, ein fløga við instrumentalum tónleiki er á veg. Men eg eri ikki heilt vísur í nær hon kemur út. Hetta verður fólkatónleikur í einfaldum samansetingum og við fleiri instrumentum.

Men tíverri hevur ein ikki hoyrt so nógv til Enekk í síðstuni. Síðan umleið mars mánað, hava teir ikki vant. Tá vóru teir í upptøkuhølinunum og gjørdu seg lidnar við fløguna, ið skal koma út í heyst. Manningin annars hevur verið virkin í øðrum samanhangum og hesir eru: Mikael Blak á kontrabass, Rógvi á Rógvu trummur, Óli Olsen við ljómborðið og Heðin Z. Davidsen spælir el-gittar. T.d. eru Rógvi á Rógvu og Unn Paturson júst komin aftur úr Svøríki, har tey hava verið í upptøkuhølunum og tikið fløgu upp. Hetta hevur verið saman við einum norðurlendskum jazzorkestri og einum kendum bassisti, Anders Jormin, sum hevur givið tvær solofløgur út á týska risastóra plátufelagnum ECM. Og Mikael Blak og Heðin Z. Davidsen hava verið á konsertferð við Yggdrasil.

Tónleikurin hjá Enekk leygarkvøldið verður merktur av at meiri rúm er fyri improvisatión, fríari samansetingar. Men kjarnin verður uttan iva sangurin/-vokalurin hjá Kára.

### 15.00 Sóljudansur (Fo)

Stórur partur av manningini úr Spælimonnunum fara at spæla tónleikin av barnafløguni "Sóljudansir" spælimanstónleikur, sum Alexandur Kristiansen hevur gjørt. Við í manningini eru Ívar Bærentsen, Angelica Nilesen, Sharon Weiss, Mikael Blak, Kári Sverrison, Kinna Poulsen, Unn Paturson.

### Spælipláss - 15.45: Par Sørman (Sv)

Her fer áskoðarin at hoyra ein trubadur, ið fer at tulka vísur av svenska yrkjaranum Dan Andersson. Sørman hevur vunnið nakrar svenskar tónleikavirðislønir, sum t.d. Sällskapet Astri & Evert Taubes Vänner og Nils Ferlin- Sällskapets Trubadurpris 2002. Fyriskipararnir siga, at um mann dámar Evert Taube átti ein at lagt leiðina fram við Syðrugøtu leygardagin.

### 17.15 - Pete og Brian (Uk/Írl)

Her er talan um eitt sindur meiri alternativan tónleik við improvisatión og leysari sangsamansetingum. Hesir báðir eru dugnaligir á fleiri ymiskum instrumentum og teir duga eisini at stemma tey. Á Tutl 25 fløguni spæla teir saman við íslendsku Úlpa, her er floytuspæl lagt omaná gittar og trummuspæl.

### 20.15 - Newtime Band (Da/Br)

Sum sagt, so verður ikki bert poleraður poppur og ráur rokkur at hoyra. Frá bólkinum Newtime Band fer man at hoyra kanadiskan fólkatónleik. Hesin minnir okkum á tónleikarvin vit hava her heima, sum eisini er hjá grannalondunum rundanum okkum. Kanadiskur spælimanstónleikur úr New England.

### 22.45: - Hanus G. Johansen (Fo)

Tann fyrsti, ið bleiv bílagdur til G! Festivalin var hesin klaksvíkingurin, hetta hendi í fjør í septembur. Hanus G. Johansen kemur at syngja og spæla nøkur av sínum løgum, sum næstan hvørt føroyskt mansbarn kennir til - ja, sjálvt tað yngra ættarliðið, kennir til hendan mann. Yngri tónleikarar hava í jøvnum millumbilum endurtulka hansara løg, nú herfyri kom "Fagra Blóma" út til føroysku útvarpini, hetta var frá rokkbólkinum All that Rain. Fyriskipararnir siga, at teir eru sera glaðir fyri at hava fingið Hanus og meta hann vera ein sera týðandi føroyskur tónleikari.

### Manningin hjá Enekk:

Mikael Blak á kontrabass, Rógvi á Rógvu trummur, Óli Olsen við ljómborðið, Heðin Z. Davidsen spælir el-gittar og Kári Sverrisson sang og gittar.

# Hinir bólkarnar leygardagin

SANDURIN

### 16.30: Gestir (Fo)

Vinnararnir av Prix Føroyar. Aftaná festivalin her, fara hesir víðari niður at spæla á Skanderborg Festival, so upp aftur at spæla á Listastevnuni, síðan er ætlanin at teir skulu spæla á Vega og eisini skulu teir í upptøkuhølini at taka eina demo upp til at senda út til risafeløgini, sum t.d. Universal og EMI.

Teir skulu niður at spæla á Skanderborg Festival fyrst í august, síðan upp at spæla á Listastevnuni og so seinni er kenda spælistaðið í Keypmannahavn Vega, á skránni. Teir fara í upptøkuhølini í oktobur, fyri at taka eina demo upp, sum teir fara at senda til plátufeløg. EMI Records ella Universal vendu sær til bólkin aftaná Prix Føroyar. Tónleikaskráin hjá Gestir verður tann sama, sum teir hava spælt niðri. Prix Føroyarløgini fara teir at spæla og afturat teimum eru fimm løg.

### 19.15: Úlpa (Ísl)

Av mongum mettur besti íslendski bólkur í tíðini. Nýskapandi bólkur, sum við melodisku løgunum fanga oyruni á rokkelskarum. Úlpa spældi tvær konsertir í Føroyum í 2002, og fyrireikararnir av G! gjørdu beinanveg av at teir skuldu spæla á festivalinum.

### 23.15: Clickhaze (Fo)

Gøtubólkurin hevur fingið stórfingin og rósandi ummæli sum til dømis "Probably the best band in Scandinavia" (helst besti bólkur í Skandinavia). Tey hava spælt á festivalum sum Roskilde, Midtfyns, Nibe, Stockholm og Reykjavík. Sangurin Daylight var best umtókti sangur í føroyska útvarpinum í 2002.

### 24.00: Kórið Gøta/-Leirvík(tala, sangur, fýrverk og føroyskur dansur)

Kórið varð stovnað í 1986 og hevur sangarar úr Gøtu og Leirvík. Tey fara m.a. at syngja fosturlandssangir.

### Spælipláss: - 18.30: Øssur & Hjalti

Tveir sera dugnaligir tónleikarar. Øssur og Hjalti fara at spæla improviseraðan tónleik - øll settini verða improviserað. Øssur Johannessen hevur givið tríggjar fløgur út áðrenn, hendan tvímanningini hevur givið eina fløgu út og tann næsta skuldi verið liðug, bíða verður bara eftir at kemur í handlarnar.

### Kambsdalur:

00.30: All that Rain (Fo)
01.15: DJ Gloryboy & GB Firstlady (Fo/Us)
02.00: KGB (Is)
02.45: All That Rain
03.15: DJ Ekkovoid (Dk)

Í høllini á Kambsdali verður dansur og DJ´ing [digjeying] ella plátusnúður. All That Rain spæla til dans, hesir eru sera væl dámdur og spæla til fleiri dansir kring landið. Frálíki sangarin Pól Arni Holm kom fyrst í hesum árinum í All That Rain, hetta er altíð sera týðandi fyri ein góðan dans.

Plátusnúður, ella hvat ein skal kalla tað, er ikki júst tað sama her á landi, sum í útlondum og í tí pulserandi modernaða tónleikin úti í heiminum. Hetta slagið av tónleiki hevur ikki gjørt sína innrás enn og tað gongur long tíð áðrenn vit fara at hoyra hendan tónleikin í døgverðatónunum.

Gittaristurin og sangarinnan úr Glorybox eru ávíkavist DJ Gloryboy og GB Firstlady, tey fara at spæla eina blanding av folk, dansitónleiki og electronica.

DJ Ekkovoid er eisini úr Glorybox. Michael hevur meiri royndir og hevur arbeitt sum professionellur DJ.

DJ KGB er eisini ein royndur DJ´ari og hann spælir eisini við einum av bólkunum, sum er á festivalinum. Spennandi verður at hoyra hetta íleggið, ið føroyski tónleikurin uttan iva fyrr ella seinni fer at taka til sín.